

Foto: Andreas Ackerup

## Socialdemokraterna

Hava í nærum eina øld verið nógv hin størsti flokkurin í Svøríki. Mona Sahlin tók við leiðsluni í 2007 eftir Görn Persson. Flokkurin varð stovnaður í 1889 og kom fyrstu ferð í stjórn í 1917. Síðan tá hevur hann sitið við valdinum meginpartin av tíðini. Í millumkrígsárunum gekk flokkurin á odda og stovnsetti vælferðarhugtakið "Folkhemmet".

Flokkurin fekk 130 av 349 plássunum í Ríkisdegnum við síðsta val.



Foto: Kristian Pohl

## Folkpartiet Liberalerna

Floksleiðari er Jan Björklund. Flokkurin varð settur á stovn í 1934, og er ein klassiskt sosialliberalur flokkur, har fríu marknaðarkreftirnar ganga hond í hond við sosiala vælferðarskipanina. Skúli og útbúgving eru millum fremstu málini hjá Folkpartiet.

Flokkurin liggur til høgru og hevur síðan 2006 verið partur av borgarligu stjórnuni.

Flokkurin fekk 28 av 349 plássum í Ríkisdegnum við síðsta val.



Foto: Fredrik Hjerling

## Miljøpartiet

Varð stovnað í 1981 og kom í Ríkisdagin í 1988, har flokkurin hevur sitið síðan, tó við onkrum styttri skáa.

Flokkurin hevur ongan formann, men tvey talsfólk, eitt av hvørjum kyni: Peter Eriksson og hin sera vælumtókta Maria Wetterstrand.

Stavnhald floksins er "Solidaritetur við djór, náttúru og vistfrøðiligu skipanina, komandi ættarlið og øll menniskju heimsins".

Miljøpartiet er á vinstravonginum og er partur av reyð/grøna blokkinum.

Flokkurin fekk 19 av 349 plássum í Ríkisdegnum við síðsta val.



Foto: Kristdemokraterna

## Kristdemokraterna

Varð stovnaður í 1964 og hevur sitið í Ríkisdegnum síðan 1991. Floksleiðari síðan 2004 er Göran Hägglund.

Upprunaliga vildi flokkurin hava fram kristin lívsvirði og etisk mál. Men seinastu árini er flokkurin vorðin ein meiri almentborgarligur konservativur flokkur við denti á familjuna í samfelagnum.

Upprunaliga var flokkurin ímóti fosturtøku, men ikki longur. Flokkurin liggur til høgru og hevur síðan 2006 verið partur av borgarligu stjórnuni.

Flokkurin fekk 24 av 349 plássum í Ríkisdegnum við síðsta val.



Foto: Sverigedemokretarna

## Sverigedemokraterna

Hevur røtur í racistiska felagsskapinum Bevar Sverige Svensk, sum eisini hevur samband við nýnazistiska umhvørvið. Undir leiðslu av Jimmie Åkesson hevur hann síðan 2005 gjørt sítt ítasta til tess at sleppa undan nazistisku fortíðini. Hetta eyðnaðist partvíst, tá flokkurin varð vigaður og góðtikin sum "stovureinur" av donsku fyrimyndini, Dansk Folkeparti.

Fremsta málið er ein herðing av útlendingapolitikkinum og flokkurin verður ofta róptur ódemokratiskur og racistiskur.

Sverigedemokraterne eru ikki í Ríkisdegnum, men á kommunuvalinum í 2006 fekk hann umboð í umleið helmingin av øllum kommunum.

Flokkurin vónar at gerast vektin á vágskálini á valinum sunnudagin. Stendur til at fáa umleið 7 prosent av atkvøðunum.



Foto: Emilia Öije

## Moderata samlingspartiet

Í dagligari talu Modernaterna, er størsti borgarligi flokkurin. Síðan 2003 undir leiðslu av Fredrik Reinfeldt, forsætisráðharra. Er positivir fyri privatum alternativum til ein almennan skúla og tænastur.

"Fyritøkur, kapping og frítt val útjavna mannamun og lata upp fyri einum samfelagi, sum byggir á felagsskap og solidaritet". Seinastu árini hevur hann fríggjað dúgliga til javnaðarveljararnar undir herrópinum "Nýggi arbeiðaraflokkurin".

Síðan 2006 hevur flokkurin verið leiðandi í borgarligu Reinfeldt-samgonguni, "Alliancen for Sverige".

Flokkurin fekk 97 av 349 plássum í Ríkisdegnum við síðsta val.



Foto: XXXX

## Vänsterpartiet

Flokkurin hevur sín uppruna í 1917, sum útbrótaraflokkur úr Socialdemokraterna. Leiðari floksins er Lars Ohly. Líka til múrurin fall rópti flokkurin seg kommunistiskan, men síðan hevur hann verið forsprákari fyri einum reformistiskum politikki við sosialismu og feminismu sum fremstu mál.

Seinastu 90 árini hevur undirtøkan hjá flokkinum ligið um 6 prosent, og flokkurin hevur fleiri ferðir verið stuðulsflokkur hjá Socialdemokratarna.

Flokkurin fekk 22 av 349 plássum í Ríkisdegnum við síðsta val.



Foto: Linus Hallgren.

## Centerpartiet

Varð stovnað í 1913 under heitinum Bondeförbundet. Flokkurin liggur í miðjuni og hevur serligan tókka til útjaðaran og smá vinnurekandi. Floksleiðari er Maud Olufsson. Seinnu árini er flokkurin farin at tekkjast høgravonginum, eftir at hava stuðlað Socialdemokraterna øll 90'ini. Tá landbúnaðurin minkaði í 1970'unum, vann flokkurin stóra undirtøku í stríðnum móti kjarnorku og í umhvørvismálum. Flokkurin hevur verið í stjórn síðan 2006.

Flokkurin fekk 29 av 349 plássum í Ríkisdegnum við síðsta val.